# Rimarúmið

## Uppskot til uppgávur




**Rimarúmið**

**Elin Michelsen**

Bókadeild Føroya Lærarafelags, 2021

Asta Wolles, Eilen Anthoniussen, Emmy Joensen
og Gunvá Magnussen
Nám 2022

## Áðrenn tit lesa

- Hyggið at permumyndini og lesið baksíðutekstin og tekstin í klaffunum.
- Tosið saman um, hvat bókin man fara at snúgva seg um.
- Hvat vita tit um rithøvundin?

## Meðan tit lesa

- Hav ein blýant og pappír við hondina og skriva niður tað, sum tú ivast í ella skalt minnast til.
- Skriva stuttan samandrátt av hvørjum kapitli, møguliga sum stikkorð.
- Tosið í flokkinum um, hvussu hesin tykisheimur er.

## Tá ið tit hava lisið

Í hesum brotinum verður arbeitt við at seta í frásjón.

- Tosið saman í flokkinum um *Rimarúmið*.
- Hvat vita tit um huldufólk í føroyskum sagnum?
- Hvat vita tit um tekstslagið fantasy?
- Kenna tit aðrar søgur, sum minna um søguna um Tóru?

©Nám

# Evni at arbeiða við

**Persónar**

### Tóra

- Hvør er Tóra?
- Lýs hana.
- Hvat man vera hent við Tóru?
- Hvat munnu marrudreymarnir snúgva seg um?
- Hvat man vera hent við foreldrum hennara?

### Billa

- Lýs Billu.
- Hvussu sær Tóra Billu aftaná, hon hevur verið í rimarúminum?

### Heri

- Lýs Hera.
- Hvussu er Heri áðrenn og aftaná, hann er fjøtraður?

Vel ein persón úr bókini, tú kundi hugsað tær at arbeitt við.

## Umhvørvi

- Lýs umhvørvið - náttúruna, skúlan, hølini o.s.fr.
- Hvussu upplivir Tóra skúlan? (Tekstbrot á s. 10)
- Hvat merkir markið millum skúlans økið og restina av oynni? (Tekstbrot á s. 63)

## Tíð

- Hvussu langa tíð spennir søgan um?
- Nær fer søgan fram? Hvussu kemur hetta til sjóndar? Haldið eyga við t.d. málburði, tøkni, klædnastíli o.ø.

©Nám

## Orð og stílur

- Hugleiðið um hesi orð og tosið um týdningin av teimum:
    - Rimarúm (s. 110-111)
    - Fjøtur (s. 121)
    - Hugabond (s. 121)
    - Ljómur (s. 217)
    - At snøra (s. 199)
    - Gávur (s. 56). Hvat merkja gávur í hesum høpi?

- Lesið brotið á s. 120-122 og tosið um, hvørja ávirkan fjøtrið hevur.
- Røddin, sum viðmerkir tað, Tóra sigur og ger. Hvønn leiklut spælir hon fyri frásøgnina?

## Aðrir spurningar at taka upp.

- Hvussu fær Tóra atgongd til rimarúmið?
- Hvussu endar bókin?
- Hvat hendi við Eleonoru, tá hon datt?
- Hvat hendi við Tóru, áðrenn hon byrjaði á skúlanum?
- Hvat vænta tit fer at henda í næstu bók um Tóru?

©Nám